# Býráðsfundur 26.08.2024

**<u>Býráðsfundur 26.08.2024 kl. 18.00</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | Avboð |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**<u>Mál til viðgerðar:</u>**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 67/2024 – Gøta til Talvhúsið/Kvinnufelagshúsið | ALMENT |
| Mál nr. 68/2024 – Byggisamtyktin Yviri í Nev matr. nr. 262a | ALMENT |
| Mál nr. 69/2024 – Fráfaringaraldur hjá starvsfólki | ALMENT |
| Mál nr. 70/2024 – Leigusáttmáli á havnalagnum – Faroe Origin | ALMENT |
| Mál nr. 71/2024 – Leigusáttmáli á havnalagnum – Jógvan M. Olsen | ALMENT |
| Mál nr. 72/2024 – Keyp av stigabili til SKS | ALMENT |
| Mál nr. 73/2024 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 76/2024 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 75/2024 – | AFTURLATIÐ |

**<u>Mál nr. 67/2024 – Gøta til Talvhúsið/Kvinnufelagshúsið ALMENT</u>**
<u>J.nr: 1204-13-2024</u>

Í umsókn, dagfest tann 13.08.2024, søkja Tofta Talvfelag og Tofta Kvinnufelag um at fáa eina gøtu til Talvhúsið/Kvinnufelagshúsið. Endamálið er at betra um atkomuviðurskiftini hjá rørslutarnaðum.

Í løtuni eru bert trappur oman til inngongdina.

Tekniska deild metir, at arbeiðið fer at kosta íalt umleið kr. 50.000.

**Á fundi, tann 15.08.2024, mælir Tekniska nevnd til at Tekniska deild fer undir at gera gøtuna.**

**Á fundi, tann 20.08.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við Teknisku nevnd og at fíggingin verður tikin av stovninum "Vegur íløga".**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**<u>Mál nr. 68/2024 – Byggisamtyktin Yviri í Nev matr. nr. 262a ALMENT</u>**
<u>J.nr.: 1206-17-2023</u>

Nes kommuna hevur lýst broyting í byggisamtyktini fyri matr. nr. 262a "Yviri í Nev". Ætlanin er at broyta økið frá einum H øki (landbúnaðarøki) til eitt K øki (øki sum loyvir el framleiðslu).

Uppskotið hevur ligið frammi til almenna hoyring frá 08.05.2024 til 29.05.2024. Freistin at koma við mótmæli ella broytingaruppskoti var 19.06.2024. Sama dag, sum freistin gekk út, bað Búnaðarstovan um longda freist at koma við viðmerking til 28.06.2024.

Umbønin varð gingið teimum á møti. Tann 28.06.2024 kom mótmælisskriv frá BST. BST heitir á Nes kommunu um at stegða ætlanunum. Heitt verður á Nes kommunu um framhaldandi at skipa matr. nr. 262a í byggisamtykt til landbúnaðarendamál. Grundgevingin er, at BST metir økið vera serliga væl egnað til landbúnað. BST mælir til, at atlit í størri mun vera tikin til landbúnað og ynskir samstundis at náttúruliga margfeldið verður vart. Eisini verður ávarað ímóti at gera inntriv í umhvørvi uttan at hava dygdargóðar árinsmetingar at vísa á frammanundan.

Óli Kristian á Torkilsheyggi og Leivur á Torkilsheyggi vóru á fundinum og greiddu frá sínum sjónarmiðið sum festarar. Teir vístu á, at landbúnaður og orkuframleiðsla kunnu ganga hond í hond og noyðast als ikki at útiloka hvørjum øðrum. Teirra niðurstøða varð tann, at tað er umráðandi at fáa staðfest bæði endamálini, tvs bæði landbúnað og orkuframleiðslu í ásetingunum fyri økið.

**Á fundi, tann 15.08.2024, mælir Tekniska nevnd til at umsitingin arbeiðir víðari við málinum og finnur eina loysn sum gagnar bæði landbúnaði og orkuframleiðslu.**

**Elin á Torkilsheyggi var úti undir viðgerðini.**

Tekniski leiðarin mælir til at tillaga økisásetingarnar fyri K-økið soljóðandi:

**<u>Ásetingar fyri K-økini</u>.**

a) Økið verður lagt til landbúnaðarjørð og orkuframleiðslubyggingar.
b) Orkuframleiðslubyggingarnar kunnu bert fremjast eftir góðkendari ætlan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki í samráð við avvarðandi partar og myndugleikar.
c) Loyvi kann gevast at byggja vegir, hús, skýli ella aðra tekniska útgerð, ið krevst

til raksturin av eini frammanundan góðkendari orkuframleiðslubygging. Tílíkar byggingar ið náttúrliga hoyra til slíkar orkuframleiðsluútbyggingar, skulu tillagast landslagi og lendi soleiðis, at teir í minst møguligan mun lýta náttúrliga landslagi í økinum.

d) Nærri ásetingar fyri K-økini kunnu verða gjørdar í serstakari byggisamtykt.

**Býráðið samtykti einmælt at taka undir við tillagaðu ásetingunum fyri K økið, sum loyva bæði landbúnaði og orkuframleiðslu.**

**Elin á Torkilsheyggi var úti undir viðgerðini**

**Mál nr. 69/2024 – Fráfaringaraldur hjá starvsfólki ALMENT**
J.nr.: 2701-10-2024

Viðv. fráfaringaraldri hjá starvsfólki hevur Nes kommuna hildið seg til 70 ár. Tað var fyrrverandi fráfaringaraldurin hjá landinum. Ymiskt er frá kommunu til kommunu, hvør fráfaringaraldur verður brúktur. Summar kommunur hava avtikið fráfaringaraldurin heilt, summar hava sín egna, meðan aðrar velja at fylgja fráfaringaraldrinum hjá landinum. Í rundskrivi frá fíggjarmálaráðnum í 2022 er almenni fráfaringaraldurin 72 ár.

Sambært ráðgeving frá KAF er tað upp til hvørja einstaka kommunu at áseta fráfaringaraldurin.

Umrøðast skal, hvør fráfaringaraldurin framyvir skal vera hjá starvsfólki í Nes kommunu.

**Á fundi, tann 20.08.2024, mælir Fíggjarnevndin til at at fylgja rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum og at fráfaringaraldurin hjá Nes kommunu verður 72 ár.**

**Tilmælið varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 70/2024 – Leigusáttmáli á havnalagnum – Faroe Origin ALMENT**
J. nr.: 803002-5-2020

Í teldubrævi, dagfest tann 03.06.2024, heitir Jónfinn Thomsen, vegna Faroe Origin, á Nes kommunu um at fáa viðurskiftini við leigusáttmálanum viðv. matr. nr. 437a, 437b og part av 435a, í rættlag.

Leigusáttmálin gekk út í 2020, og síðani tá hava partarnir ikki havt leigusáttmála, orsakað av eini ósemju millum Faroe Origin og ein fíggingarstovn. Faroe Origin hevur tó goldið leigu til Nes kommunu fyri alt tíðarskeiðið.

Nýggjur sáttmáli varð viðgjørdur og samtyktur í 2020. Faroe Origin og umsitingin hjá Nes kommunu eru samd um at halda fast við tann sáttmálan.

**Á fundi, tann 20.08.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við uppskotinum og at skriva undir leigusáttmála við Faroe Origin.**

**Tilmælið varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 71/2024 – Leigusáttmáli á havnalagnum – M/B Glúpur v/Jógvan Martin Olsen ALMENT**
J. nr.: 803252-2-2020

Í samband við at Jógvan Martin Olsen vegna M/B Glúp fyri nøkrum árum síðan fekk byggiloyvi til goymslubygning sunnanfyri neystini í Krabbaurð, er neyðugt at gera leigusáttmála millum partarnar fyri undirlendið. Uppskot til leigusáttmála er viðheft.

**Á fundi, tann 20.08.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við leigusáttmálanum.**

**Tilmælið varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 72/2024 – Keyp av stigabili til SKS ALMENT**
J. nr.: 1105-7-2023

Skálafjarða Sløkkilið hevur tørv á nýggjum stigabili fyri at trygdin í økinum kann verða nøktandi. SKS hevur fingið tilboð, sum ljóðar á kr. 6.474.216,63, tá er trygging og kommunu-mvg íroknað.

Ætlanin er at fíggja bilin í tveimum, so at 50% verða goldin beinaveg og írestandi 50% verða goldin, tá bilurin kemur til landi, annaðhvørt í 2025 ella 2026.
Býtislykilin millum kommunurnar verður eftir fólkatalinum pr. 01. januar í árinum gjaldast skal.

Fyri 2024 er parturin hjá Nes kommunu 21,57%, sum svarar til kr. 698.120.
Nes kommuna hevur sett av fyri keypinum á fíggjarætlanini fyri 2024.

**Á fundi, tann 20.08.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við keypinum og at fíggingin verður tikin av stovninum "Sløkkiliðið íløga".**

**Tilmælið varð einmælt samtykt.**